# Rannvá vann Dansolution í Keypmannahavn

**Seinasta vikuskiftið vann Rannvá Káradóttir kappingina Dansolution í Keypmannhavn. Dansolution er ein árlig kapping, sum Dansescenen skipar fyri. Í ár vóru 16 koreografar valdir út til at sleppa at luttaka í kappingini**

KAPPING

Kappingin byrjaði 7. september og endaði leygarkvøldið 10. september. Eftir at allar koreografiurnar høvdu verið framførdar á Dansescenen í síðstu viku, vóru sjey stykki vald út til finaluna leygarkvøldið. Tað vóru áskoðarnir, ið kundu atkvøða, hvør skuldi vinna kappingina, og var tað koreografiðin hjá Rannvá, ið fekk mest atkvøður.

Umframt Rannvá vóru tveir aðrir vinnarir, ið vórðu valdir av einum dómarapaneli. Vinninginurin er at gera eina nýggja produktión til Dansescenen, sum skal sýnast fram í mars 2006. Harafturat skal vinnandi stykkið sýnast fram í Malmø og London.

Stykkið hjá Rannvá hevur heitið »Too short…«. Dansarir vóru Seke Chimutengwende, Rannvá Káradóttir og Kristina Sørensen, og hevði Marianna Mørkøre gjørt búnarnir.

Føroyingar hava møguleika at síggja hetta verk á Tjóðpalli Føroya 28.-29. oktober.



*Mynd: Marianna Mørkøre*

# Eitt hav av upplivingum

**Ferðaráð Føroya hevur latið prenta nýggjan faldaran »Kava í Føroyum - eitt hav av upplivingum«, har millam annað verður víst á mong góð støð at kava kring oyggjarnar**

## Nýggjur faldari

Havið kring Føroyar sigst vera eitt hitt reinasta í verðini, og kring oyggjarnar eru hópin av góðum og vøkrum plássum at kava. Bert fá hava upplivað vakra og fjølbroytta havbotnin við Føroyar, men í nýggja faldaranum »Kava í Føroyum« fæst nú góð vegleiðing um bæði støð og vøkstur.




## Rannsóknarferð

Tá ið tú kavar, kanst tú fara á eina rannsóknarferð í taraskógini, kanna djóralívið í havsins holum, ella sveima millum planturnar í einum fjølbroyttum og fjarskotnum heimi.

Í tøttu taraskógini kring Føroyar vaksa nógv ymisk tarasløg, og javni hitin í sjónum og skiftandi havbotnurin kring Føroyar menna eitt ríkt og fjølbroytt djóralív, og ger hetta havbotnin sera vakran á at líta. Nógv áhugavert er at síggja í rivum og undir steinum.

Í faldaranum kann ferðamaðurin umframt at nema sær kunning um góð kavingarstøð, eisini læra um okkara plantu- og djóralív undir vatnskorpuni. Viðurskifti, sum ein skal fyrihalda seg til tá ið kava verður, eru sálvandi eisini við, tí trygdin skal verða av tí besta.

## Dagført tilfar

Tilfarið í nýggja faldaranum hevur í fleiri ár ligið úti á gomlu heimasíðuni hjá Ferðaráð Føroya og varð upprunaliga skrivað í samstarvi við m.a. Smyril Line, kavarafeløg og ferðaskrivstovur. Nú er alt tilfarið umsíðir samla í tíðarhóskandi faldara. Tilfarið er dagført, og er sniðið broytt. Faldarin er tøkur á donskum, enskum og føroyskum.

Umframt faldaran, er eisini nýggj heimasíða á trimum málum á veg um kaving, og verður hetta væntandi ein hjálpandi liður í menningini av, at selja Føroyar sum eitt ferðamannaland við nógvum virknum tilboðum til ferðafólk.

Faldarin fæst ókeypis á kunningarstovum kring landið.

-ave-

# Snøgg Náttúrusøga

**Nýggja bókin Náttúrusøga. Dýr og plantur hjá Føroya Skúlabókagrunni er snøgg, upplýsandi og sera løtt at finna runt í**

BÓKAÚTGÁVA

Bókin Náttúrusøga. Dýr og plantur er ætlað sum ein hent bók hjá teimum, sum vilja vita meira um tey einstøku dýrini og tær einstøku planturnar í Føroyum.

## Løtt og livandi

Á einum løttum máli verður greitt frá, hvussu dýr og plantur liva. Frá byrjan hevur høvundurin valt at leggja dent á at lýsa tey einstøku dýrini og planturnar, heldur enn vistfrøðina. Ongar myndir eru í bókini - hinvegin eru ofta stuttu umrøðurnar av vøkstrum og verum óvanliga løttar hjá lesaranum at taka til sín, samstundis sum tær eru sera upplýsandi. Hartil hevur bókin eitt greitt og væl skipað innihaldsyvirlit, og aftast er eitt drúgt leitiorðayvirlit.

## Ískoyti

Bókin byggir á tær tríggjar gomlu Dýralærurnar, sum tey flestu kenna. Um tað mundi, tá handritið til Náttúrusøgu varð skrivað, vórðu lærugreinir sum lívfrøði grundleggjandi umskipaðar og gjørdust partur av nýggjari lærugrein, ið fekk heitið »Náttúra og tøkni«. Sum avleiðing av hesum fór Skúlabókagrunnurin undir útgávu av ikki bara høvuðsverkunum Náttúra og tøkni, 1,2 og 3, men eisini hópin av fjølbroyttum ískoytistilfari til nýggju lærugreinina.

Náttúrusøga. Dýr og plantur er ein tílík ískoytisbók at taka til hjá lærarum og næmingum, sum sjálvir skulu finna sær tilfar fram. Enn vantar tilfar um føroysku náttúruna, eisini á ymsum torleikastigum og vónar Skúlabókagrunnurin, at hendan bókin kann vera eitt íkast.

Tað er Theodor Hansen, fyrrverandi lærari, sum hevur skrivað Nátturusøga. Dýr og plantur. Bókin er 260 síður og fæst í bókabúðunum.

-ave-




*Umrøðurnar av verum øg vøkstrum í nýggju Náttúrusøga. Dýr og plantur eru sera upplýsandi og løttar hjá lesaranum at taka til sín*

# Føroysk hjálp til Niger og New Orleans

**Reyði Krossur í Føroyum hevur sent enn meiri pening til afrikanska landið Niger, og nú eisini til USA**

NEYÐHJÁLP
*Snorri Brend*

**Hjálp:** Fyri føroyingar er eingin munur á teimum svøltandi í afrikanska landinum Niger og á teimum mongu í USA, sum hava mist alt, tey áttu eftir ódnina Katrinu.

Tað kann Reyði Krossur í Føroyum í øllum førum staðfesta, nú tey hava gjørt upp fyri tann innsavnaða peningin til hesi bæði neyðstøddu økini.

– Vit hava higartil fingið hesar gávur, sum er merktar til hetta: Til Nigeru eru innkomnar 19.100 kr, og 3.000 kr. til USA, upplýsir Reyði Krossur.

Hesin peningurin ger eisini mun hjá fólkinum á hesum støðum, men kortini er neyðugt við enn meiri pening.

Í Niger er serligur tørvur á peningi at gjalda mat fyri júst nú. Væntast kann hinvegin, at um nakrar mánaðir fer heystingin at geva nakað av mati.

– Tí hava vit aftur sent 50.000 kr., ella í alt 100.000 kr. til neyðhjálpina í Niger og har um leiðir, sigur Reyði Krossur.

Peningin til USA hevur felagsskapurin sent umvegis Dansk Røde Kors.